tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Avdúkandi fimmari

## *Oddagrein*

FIMMARIN í útvarpinum mikudagin var bæði avúkandi og óhugnaligur. Mangur lurtari mundi gerast púrasta paff, tá ein skitin skola fyri og onnur eftir regnaði niður yvir formannin í Búskaparráðnum, Bjarna Olsen. Líka mikið hvørja meining tú hevur um hetta málið viðvíkjandi fiskidøgunum, so er tað burturvið at niðurgera formannin í Búskaparráðnum, soleiðis sum bæði fiskimálaráðharrin og vinnulívsmenn gjørdu í fimmarasendingini mikudagin. Tað sømdi seg ikki einum fiskimálaráðharra at tosa sum hann gjørdi. Hann gjørdi sær sjálvum eina bjarnatænastu við at vanvirða hetta høga embæti. Soleiðis tosar og argumentar ein fiskimálaráðharri ikki í ár 2000.

AT EIN TINGMAÐUR ger tað, er nakað annað. At formaðurin í Reiðarafelagnum sáar iva um trúvirði ráðsins við at tosa um bílagt uppskot var eisini undir alt lágmark. At vinnulívsmaðurin Bjarti Mohr fer í „hernað“ móti formanninum í Búskaparáðnum er so upp til hansara, hóast tað uttan iva eru mong, sum hava stúrsað við av hansara úttalilsunum.

VIT skulu hesaferð lata støðutakan til sjálvt uppskotið liggja, tó at vit meta tað vera rætt at taka hetta málið upp til endurskoðan, nú tað nettup í hesum døgum verður tosað um ognarrættin til tilfeingi í undirgrundini eisini. Tað átti ikki at verið munur á hesum. Tað er meira tað prinsipiella í málinum vit her vilja nema við. Hvat er uppgávan hjá Búskaparráðnum? Eftir tí vit hava skilt, er hon at geva objektiv tilmæli um mál, sum hava týdning fyri samfelagsgongdina - óheft av tí politiska valdinum.

BÚSKAPARRÁÐIÐ skal ikki lata seg ávirka av tí politiska „trendinum“, sum er her og nú. Og tá ein meiriluti í ráðnum kemur við einum slíkum tilmæli sum tí umrødda, so botnar tað væl í, at hann metir hetta vera tað skilabesta og mest rætta fyri alt Føroya fólk. Tað hevur alla tíðina verið stavnhaldið hjá Búskaparráðnum at koma við tilmælum, ið miðja móti at fáa hetta samfelagið at bera seg. Tvs. at fáa fiskivinnuna at geva yvirskot. Hetta tilmæli eigur helst eisini at síggjast í hesum ljósi. Fimmarin var til lítlan sóma fyri fiskimálaráðharran, tá hesin rør uppundir, at Ráðið skal taka hædd fyri tí politikki, sum núverandi landsstýrið rekur, ja at politikararnir skulu kunna brúka hetta annars fakliga, kompetenta og óhefta ráð til egið gagn.

***Sosialurin***

# Stór synd í suðuroyingum at fingið oljuvinnuna

*–Tá hevði oljan verður uppi, fer Suðuroyggin at liggja steindeyð, sigur formaðurin í sjálvstýrisflokkinum*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Vit hava sæð tað í øðrum økjum, sum ein einstøk vinna hevur pumpað upp:
– Tá ið tann vinnan heldur uppat, eru hesi økini steindeyð.

Og hesa lagnu vildi sjálvstýrisflokkurin ikki skuldi koma yvir Suðuroynna.

Flokkurin heldur, at tað hevði verið so synd í Suðuroyingum at fingið oljuna, at hann vil ikki uppá nakran máta løggeva um, at oljuvinnan skal vera í Suðuroynni.

Men sjálvstýrisflokkurin var ikki einsamallur um at nokta fyri at áleggja oljufeløgunum, hvaðani tey skulu reka sítt virksemi.

Tí tá ið uppskotið frá javnaðarflokkinum um at leggja oljuhavnina í Suðuroy, kom til atkvøðugreiðslu, fall tað, tí bara 11 tingmenn atkvøður fyri, ein var blonk og 19 atkvøddu ímóti

Tá ið málið var til viðgerðar í tinginum í gjár, segði framsøgumaðurin hjá sjálvstýrisflokkinum, Sámal Petur í Grund, at tað var heilt burturvið at taka undir við uppskotinum hjá javnaðarflokkinum um oljufeløgini skulu reka virksemið sítt útfrá Suðuroynni.

Hann vísti, at ein samd vinnunevnd hevði júst víst á vandan fyri at samfelagið bleiv kollrent av oljuvinnuni.

– At løggeva eina oljuvinnu, sum kann kollrenna altsamfelagið, út á eitt øki, er heilt burturvið.

Tí kann oljuvinnan kollrenna samfelagið, kann tað í nógv størri mun kollrenna eina oyggj. og einaferð skal tað eisini takast upp aftaná oljuvinnuna og tá fer Suðuroyggin at liggja í andaleypi.

Hann segði, at vit hava sæð tað fyrr í økjum, sum ein einsamøll vinna hevur pumpað upp.

– Tá ið tann vinnan er uppi, fara hesi økini at liggja steindeyð, tí tað fer Suðuroyggin eisini at gera aftaná oljuvinnuna.

Og so spurdi hann, hvat hevði hent, um uppskotið fellur. Hevur tingið so samtykt, at oljuvinnan ikki skal verða í Suðuroynni?, spurdi hann.

Henrik Old helt, at mangt var í neyðini nýtt og hann helt at tað var gott gjørt av Gamla Sjálvstýrinum at vera so framskygd, at teir longu nú dugdu at meta um trupulleikar, sum kanska fóru at taka seg upp um 30, 50 ella kanska 100 ár.

Men tað álit hevði Henrik Old á okkara eftirkomarum, at kemur tað hartil, at trupulleikar av hesum slagnum fara teir eisini at megna at loysa.



*Allir teir nógvu áhoyrararnir í tinginum mikudagin hoyrdu Sámal Petur í Grund siga, at hann hevði ikki hjartað til at leggja oljuvinnuna í Suðuroynni, tí tað hevði forkomið Suðuroynni, segði hann.*

Men hann helt, at tað var nyttuleyst at próvføra fyri einum flokki, sum var komin til tað niðurstøðu, at vandin var størstur tá ið oljan var uppi.

Jóannes Eidesgaard helt tað hava týdning, at vit so tíðliga sum gjørligt vístu á eitt øki, har oljuvinnan skuldi savnast.

Annars ivaðist hann ikki í, at Sámal Petur í Grund hevði misskilt, hvat ein útgerðarstøð var.

Ein útgerðarstøð í Suðuroynni merkir ikki, at vinnan aðrastaðni ikki eisini fær ov mikið at gera.

– Tað merkir bara, at tað, sum skal út á ein pall og tað, sum kemur av pallinum aftur, skal um eina útgerðarhavn.

Annars helt formaður javnaðarfloksins, at tað var týdningarleyst at tosa um, hvat hendi í Suðuroynni, tá ið oljan einaferð verður uppi.

– Kemur onki virksemið har suðuri, doyr Suðuroyggin úr frammanundan.

Annars vísti hann á, at spurningurin um framtíðina hjá útjaðaranum var eitt landspolitiskt mál.

Tað munnu aðrir enn javnaðarflokkurin halda, tí tingmenn úr øllum flokkum vóru uppi í útjaðarasamgonguni, sum Jógvan við Keldu tók stig til, segði Jóannes Eidesgaard.

***Sámal Petur í Grund*:** Eg skilji ikki, hvussu tað kann vera landspolitiskt at løgeva alla oljuvinnu í eitt stað í Føroyum. Høvdu tey sagt sum var, at talan var um eitt lokalmál, so var tað tað, tað var.

Men at løggeva oljuvinnuna burturfrá øllum hinum útjaðaranum, til Suðuroynna, hevði verið til óbótaligan skaða fyri samfelagið, og eisini fyri Suðuroynna, tí hon hevði komið at ligið steindeyð aftaná.

***Heini O. Heinesen*:** Verður tað so vandamikið fyri Suðuroynna at fáa oljuvinnuna, sum Sámal Petur í Grund heldur, hvussu verður so vorðið í miðstaðarøkinum, tá ið oljuvinnan hevur ruddað alt annað virksemið burtur har.

– Tá verða tað ikki nógvar skipaumvælingar á Tórshavnar Skipasmiðju, tí oljuvinnan hevur tað við sær at troka aðra vinnu burtur. Tað er ógvuliga hóskandi at leggja eina oljuhavn í Suðuroynni.

– Tað er fullkomiliga misskilt, at vinnur aðrastaðni ikki sleppa at veita tænastur til oljuvinnuna, fyri tað, um hon verður í Suðuroynni, tí tað sleppa tær.

***Sámal Petur í Grund:*** Nú hevur ein flokkur tikið seg burturúr teirri felags semju, sum hevur verið, at oljuvinnan skal koma øllum landinum til góðar.

– Men eftir uppskotinum hjá javnaðarflokkinum er ongin ivi um, at oljuvirksemið skal leggjast í Suðuroynni og tað er ikki í samsvari við støðuna hjá tinginum higartil

– Vit mugu ansa eftir, at vit ikki leggja fótonglar í vegin fyri oljuvinnuna, so at hon ikki fer arbeitt mest skynsamiliga og tað er ein samd samgonga sum vil, at oljuvinnan skal koma øllum landinum til góðar og tað hevur andstøðan verið samd í - líka inntil nú.

Og hann skilti ikki, hvussu tingmenn úr øðrum valdømum kundu fáa seg til at løggeva oljuvinnuna burtur sínum egna valdømi.

***Henrik Old*:** Tað er ikki óvanligt aðrastaðni, at politikarar seta oljuvinnuni.

Og at tingmenn úr øðrum valdømum skulu fáa trupulleikar av hesum, trúgvi eg onki uppá, tí teir síggja, at hetta er eitt neyðugt stig at taka.

***Dan R. Petersen:*** Eg síggi Suðuroynna sum ein part av Føroyum, og at rætta hana uppaftur, er ein líka stóra uppgáva hjá mær, sum ein suðuroyartingmaður. Hetta er ein landsuppgáva.

***Jóannes Eidesgaard:*** Hetta er aftur eitt dømi um, at tingið krýpur undan, tá ið eitt mál verður ov heitt, sum t.d. tá ið tað skal atkvøðast til frama fyri.

***Hergeir Nielsen:*** Eg havi ávara javnaðarflokkin ímóti at leggja eitt uppskot, sum hetta, fram.

– Men, hvat hendir, um løgtingið fellur uppskotið um at leggja útgerðarhavn í Suðuroy. So er Suðuroy einasta pláss í landinum, at løgtingið hevur tikið støðu til, at ein útgerðarstøð ikki skal vera. Tað er álvarsamt, tí tá kann kann ongin áleggja landsstýrismanninum, hvat hann skal hugsa og eg vóni, at javnaðarflokkurin tekur fulla ábyrgd av málinum um tað fellur.

***Jenis av Rana:*** Tað kann ikki fara afturvið borðinum, sum Sámal Grund førir fram. Hetta snýr seg um at byggja Suðuroynna upp og at grundfesta hana við til at hava livilíkindi framyvir.

Hetta snýr seg eisini um at taka eitt øki fyri og annað eftir og tryggja tí livilíkindi framyvir, og nú er tørnið komið til Suðuroynna.

***Óli Breckmann*:** Fellur hetta uppskotið, merkir tað kanska, at Suðuroyggin verður vald frá, tá ið oljuvinnan skal leggjast til rættis. Hann segði eisini, at hann hevði ikki vænta, at tingmenn úr einum parti í landinum skuldi offra sítt vældømi til frama fyri eitt annað.

Teir, sum atkvøddu fyri uppskotinum at at leggja oljuhavn í Suðuroy, vóru allir tinglimirnir úr javnaðarflokkinum, umframt Hergeir Nielsen og Heini O. heinesen úr Tjóðveldisflokkinum. Fólkafloksmaðuri Eyðun Viderø atkvøddi blankt og øll hini atkvøddi ímóti.



# Hergeir sveik Suðuroynna



*Hevur Hergeir Nielsen skrivað brævið upp á nakkan á Tjóðveldisflokkinum, er hann ikki skikkaður at sita á tingi, heldur næstformaðurin í Suðuroyar Oljuvinnuráð*

*– Vit høvdu fingið váttan frá Hergeir Nielsen fyri, at tjóðveldisflokkurin hevur einmælt samtykt, at oljuhavn skuldi verða í Suðuroynni, sigur Rógvi Thomsen*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Er mín illgruni rættur, er Hergeir Nielsen ikki skikkaður at sita á tingi.

Tað var ein rættiliga barsagdur næstformaður í Suðuroyar Oljuvinnuráðið, sum vit høvdu í telefonini í gjáramorgunin.

Formaðurin í ráðnum, Viberg Sørensen, var ikki at hitta. Men næstformaðurin, Rógvi Thomsen, er bæði vónbrotin, og ørkymlaður av tí, sum fór fram í løgtinginm mikudagin, tá ið uppskotið frá javnaðarflokkinum um at áleggja oljufeløgunum at hava útgerðarstøð í Suðuroynni varð felt.

Tað, sum hann er serliga ørkymlaður av, er, at bara tveir tjóðveldismenn, Hergeir Nielsen og Heini O. Heinesen, atkvøddu fyri.

– Vit høvdu annars alla orsøk til at vænta, at, allur tjóðveldisflokkurin fór at taka undir við uppskotinum, tí tað hava vit fingið vissu fyri.

Hann sipar til eitt bræv, sumSuðuroyar Oljuvinnuráð fekk frá Hergeir Nielsen í november í fjør.

– Í tí brævinum boðar hann okkum frá, at málið er viðgjørt á floksfundi og at tjóðveldisflokkurin stendur sum ein maður í spurninginum um oljuhavn á Suðuroynni.

– Hergeir Nielsen sigur, at málið um oljuhavn í Suðuroynni hevur fleiri ferðir verið umrøtt á floksfundi.

– Og á einum floksfundi, har tað varð viðgjørt, samtykti flokkurin einmælt at útgerðarhavnin skuldi leggjast í Suðuroynni.



Hergeir Nielsen,
løgtingsmaður

Vági, tann 10. november 1999

SOC
Suðuroyar Oljuvinnuráð
P.O.Box 7
800 Tvøroyri

Hergeir Nielsen

*Brævið, sum Hergeir Nielsen sendi Suðuroyar Oljuvinnuráð 10. november í fjør*

Hann segði eisini, at landsstýrismenn floksins fingu til uppgávu at leggja málið fram á landsstýrisfundi.

Og har var tað umrøtt við støði í tilmælinum frá tjóðveldisflokkinum um at leggja virksemið í Suðuroynni, sigur Hergeir Nielsen í brævinum til Suðuroyar Oljuvinnuráð.

## Ikki skikkaður

Næstformaðurin í oljuvinnuráðnum er tí rættiliga ørkymlaður av, at bara tveir tjóðveldismenn atkvøddu fyri uppskotinum at leggja virksemið í Suðuroynni.

– Er tað so, at Tjóðveldismenn veruliga hava samtykt málið á fundi, men eru bakkaðir í síðstu løtu, er tað vanæriligt.

– Er tað hinvegin so, at Hergeir Nielsen hevur skrivað brævið uppá nakkan á øllum Tjóðveldisflokkinu, uttan at teir hava vitað av tí, er hann ikki skikkaður at sita á tingi.

– So hevur hann svikið bæði oynna og veljaran

Og Rógvi Thomsen heldur, at tað er nógv, sum bendir á tað seinna. Hann sipar til, at beint tá ið hetta kom fram í november í fjør, vóru tað tinglimir úr Tjóðveldisflokkinum, sum vístu tí aftur og søgdu, at tað passaði ikki, at flokkurin var samdur um hetta.

Fleiri viðmerkingar hevur hann ikki í løtuni

## Eitt misálit

Rógvi Thomsen heldur, at atkvøðugreiðslan í tinginum í gjár um oljuhavn í Suðuroynni er eitt misálit á Suðuroynni.

Hann heldur eisini, at atkvøðugreiðslan vísir, at samgongan hevur sett sær fyri at føra ein miðsavningarpolitikk.

–Atkvøðugreiðslan vísir eisini, at tinglimir hava ikki skilt ta álvarsomu støðu, sum Suðuroyggin er komin í, við lítlum barnsburðartali, fráflyting og ongum arbeiðsmøguleikum hjá fólki við útbúgving.

Hann setir nú sína einastu vón til, at tingmenn taka undir við uppskotinum, sum tinglimir úr fleiri flokkum ætla at leggja fyri tingið í dag um at leggja oljuvinnuna út til útjaðaran.

–Og eg má ásanna, at eg eri bjartskygdur um atkvøðugreiðsluna í morgin, tí eg vænti, at tinglimir úr útjaðaranum fara at standa saman um tað.

– Tað er tað næstbesta, vit kunnu fáa. Og verður tað samtykt, vænti eg, at Suðuroyggin stendur rættiliga sterk, tí vit hava í hvussu so er tveir góðar firðir, sum eru vælegnaðir til endamálið, og so góðar umstøður eru neyvan aðrastaðni í útjaðaranum, sigur næstformaðurin í Suðuroyar Oljuvinnuráði. Hann sigur hinvegin, at taka tinglimir ikki undir við at oljuuvinnan skal vera í útjaðaranum, er tað tað sama sum at gera av, at hon skal vera í miðstaðarøkinum. Og tá fer fráflytingin at at taka rættiligt dik á seg, sigur Rógvi Thomsen.

Vit fingu ikki fatur á Hergeir Nielsen, áðrenn blaðið fór til pentingar

**ÚTSØLAN HELDUR FRAM**

**PUMA Barnaskógvar**
fyrr upp til 399.-
**NÚ 150.-**

**NIKE Air Perseus Renniskógvar**
fyrr 649.-
**NÚ 299.-**

**NIKE Air Kimbia Renniskógvar**
fyrr 899.-
**NÚ 349.-**

**ADIDAS Jakkar til børn**
fyrr 699.-
**NÚ 299.-**

**PUMA Innandura fótbóltskógvar**
fyrr 499.-
**NÚ 299.-**

**NIKE Cross Training skógvar**
fyrr 549.-
**NÚ 299.-**

**ADIDAS Drakt, til vaksin**
fyrr 699.-
**NÚ 399.-**

**PUMA Joggingsett til vaksin**
fyrr 499.-
**NÚ 200.-**

**Eisini hava vit ymiskar fótbóltskógvar sum eru nógv niðursettir og onnur góð tilboð**

**ÍTRÓTTUR • SMS • Tel. 31 51 77**

Sosialurin - 311820